# Rossatrygd
# tryggingartreytir

TRYGD

nr. 19.2-4
Januar 2021

www.trygd.fo

# Innihaldsyvirlit


| 1. | Alment | Síða |
|---|---|---|
| 1.1 | Lóggáva | 3 |
| 1.2 | Hvat fevnir tryggingin um? | 3 |
| 1.3 | Hvør er tryggjaður? | 3 |
| 1.4 | Á hvørjum støðum tekur tryggingin við? | 3 |
| 1.5 | Eigaraskifti | 3 |
| 1.6 | Meirvirðisgjald | 3 |
| 1.7 | Nýtsla av rossinum | 3 |

| 2. | Rossaábyrgdartrygd | Síða |
|---|---|---|
| 2.3 | Tryggingin fevnir um | 3 |
| 2.4 | Endurgjaldsupphæddir | 3 |
| 2.5 | Tryggingin fevnir ikki um | 3 |
| 2.6 | Næt tekur tryggingin við? | 3 |

| 3. | Rossalívstrygd | Síða |
|---|---|---|
| 3.2 | Nær kann trygging teknast? | 3 |
| 3.3 | Tryggingin fevnir um | 3 |
| 3.4 | Niðurskriving í endurgjaldinum | 3 |
| 3.6 | Tryggingin fevnir ikki um | 4 |

| 4. | Felagstreytir | Síða |
|---|---|---|
| 4.1 | Tá trygging verður teknað | 4 |
| 4.2 | Dupulttrygging | 4 |
| 4.3 | Rindan av tryggingargjaldi | 4 |
| 4.4 | Prístalsviðgerð | 4 |
| 4.5 | Broyting av tryggingartreytum og gjaldsskrá v.m. | 4 |
| 4.6 | Váðabroytingar | 5 |
| 4.7 | Sertreytir | 5 |
| 4.8 | Serlig undantøk | 5 |
| 4.9 | Gildistíð og uppsøgn | 5 |
| 4.10 | Skaði elvdur við vilja ella av ósketni v.m | 5 |
| 4.10.1 | Grovt ósketni | 5 |
| 4.10.2 | Identifikatión (javnseting) | 5 |
| 4.10.3 | Vanligt ósketni | 5 |
| 4.10.4 | Rúsandi løgur ella evni | 5 |
| 4.11 | Kærumøguleikar | 5 |
| 4.12 | Skyldan hjá tryggjaða | 5 |
| 4.13 | Iðranarrættur | 5 |

| 5. | Skaðafráboðan | Síða |
|---|---|---|
| 5.1 | Tá ið skaði hendur | 6 |
| 5.4 | Skaðatænastan | 6 |
| 5.5 | Skyldur tryggingartakarans í sambandi við skaða | 6 |

| 6. | Trygging fyri varandi og ólekjandi breki ella sjúku í beinunum | Síða |
|---|---|---|
| 6.1 | Treyt fyri tryggingini | 6 |
| 6.2 | Hvat fevnir tryggingin um? | 6 |
| 6.3 | Áseting av endurgjaldinum | 6 |
| 6.4 | Tryggingin fevnir ikki um | 6 |

## 1. Alment

### 1.1 Lóggáva

Umfram hesar tryggingartreytir er føroysk lóggáva á økinum og møguligar sertreytir á tryggingarskjalinum galdandi.

### 1.2 Hvat fevnir tryggingin um?

Møguleiki er at tekna Rossaábyrgdartrygd (grein 2), Rossalívstrygd (grein 3) ella trygging fyri varandi og ólekjandi breki ella sjúku í beinunum (grein 6). Á tryggingarskjalinum er tilskilað, hvat tín tryggingin fevnir um.

### 1.3 Hvør er tryggjaður? (tryggjaði)

1.3.1 Tryggingartakarin við húski, sum eigur tryggjaða rossið. Við húski er at skilja: Húsfólk, herundir fosturbørn og børn, ið tryggjaði hevur til fosturs, sum búgva hjá tryggingartakaranum. Somuleiðis persónar, ið eru giftir við tryggingartakaranum ella liva í føstum parlagi við tryggingartakaranum og/ella heimabúgvandi børnum hansara.

1.3.2 Fyri rossaábyrgdartryggingina er hann, ið hevur rossið, somuleiðis tryggjaður.

### 1.4 Á hvørjum støðum tekur tryggingin við?

Tryggingin er galdandi í Føroyum og á ferðum uttanlanda í upp til 3 mánaðir.

### 1.5 Eigaraskifti

Trygd skal hava fráboðan beinanvegin, tá rossið skiftir eigara. Nýggjur eigari er tryggjaður í 14 dagar eftir eigaraskifti, um ongin onnur trygging er teknað fyri rossið.

### 1.6 Meirvirðisgjald

Eitt møguligt endurgjald verður latið uttan meirvirðisgjald, um tryggjaði er mvg-skrásettur, tá skaðin hendi.

### 1.7 Nýtsla av rossinum

Broyting í nýtsluni av rossinum skal fráboðast Trygd beinanvegin. Verður hetta ikki gjørt, kann tað fáa avleiðingar fyri møguligt endurgjald frá Trygd.

## 2. Rossaábyrgdartrygd

**(er bert galdandi, um tað er tilskilað á tryggingarskjalinum)**

2.1 Tryggingin fevnir um tað tal av rossum, sum nevnt er í tryggingarskjalinum.

2.2 Tryggingin dekkar í øðrum lagi í forhold til eina møguliga aðra ábyrgdartrygging av rossum.

### 2.3 Tryggingin fevnir um:

1. Tað ábyrgd, ið áløgd verður honum, ið hevur ross, sambært galdandi rættarsiðvenju ella lóggávu á økinum.
2. Kostnað í sambandi við eina møguliga rættarsak og tær rentur, ið skaddi fær tillutaðar, eins og útreiðslur í sambandi við at óheimilað krav verður sett móti einum av teimum tryggjaðu. Útreiðslur sambært hesi grein verða bert endurrindaðar, um tær eru innanfyri tryggingarupphæddina fyri persón- ella lutaskaða, sí grein 2.4.

### 2.4 Endurgjaldsupphæddir

2.4.1 Endurgjald verður latið fyri persónsskaða upp til kr. 10.000.000 fyri hvørja skaðahending.

2.4.2 Endurgjald verður latið fyri lutaskaða upp til kr. 5.000.000 fyri hvørja skaðahending.

2.4.3 Endurgjaldið verður uppgjørt vísandi til galdandi Endurgjaldsábyrgdarlóg.

### 2.5 Tryggingin fevnir ikki um:

1. Persónsskaða á tryggingartakaran ella húski hansara.
   a) Um rossið verður ansað/røkt av øðrum og ger skaða á hesar persónar, fevnir tryggingin ikki um persónskaða á røktaran og/ella húski hansara.
   b) Tó fevnir tryggingin um persónsskaða á børn hjá tryggingartakaranum ella røktaranum, um tey eru undir 14 ár.
2. Skaða á djór ella lutir, sum tey tryggjaðu, brúkarin ella røktarin eiga, brúka ella hava brúkt, goyma, flyta, virka, viðgera, hava lagt undir seg, ella av øðrum grundum, enn hesum frammanundan nevndu, hava undir hond.
3. Skaða á lutir, sum verða nýttir undir venjing av rossinum.
4. Skaðar elvdir við vilja, um persónurin, ið hevði ábyrgdina av rossinum, var fyltur 14 ár.

### 2.6 Nær tekur tryggingin við?

Tryggingin fevnir um skaða staðfestur í tryggingartíðini, sama nær ábyrgdarelvandi hendingin barst á.

## 3. Rossalívstrygd

**(er bert galdandi, um tað er tilskilað á tryggingarskjalinum)**

3.1 Tryggingin fevnir um tey ross, ið nevnd eru á tryggingarskjalinum.

3.2 Tryggingin kann teknast, frá tí at fylið er 9 dagar gamalt. Er fylið tvíburði, kann tryggingin ikki teknast, fyrr enn fylið er 30 dagar gamalt.

### 3.3 Tryggingin veitir endurgjald um rossið:

1. Doyr sum fylgja av sjúku ella vanlukkutilburði.
2. Fær skaða undir transporti, av eldi ella toruniðurslættri.
3. Verður kravt avlívað av djóralækna, sum fylgja av sjúku, vanlukkutilburði ella skaða sambært nr. 2 og/ella nr. 4.
   a. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at djóralækni váttar, at avlívingin var neyðug.
4. Verður stolið.
   a) Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at stuldurin verður fráboðaður løgregluni á staðnum beinanvegin, og at rossið ikki kemur afturíaftur innan 4 vikur eftir, at tað er stolið.

3.4 Endurgjaldið kann ikki fara uppum tryggingarupphæddina, ið er nevnd í tryggingarskjalinum.

3.5 Eftir at rossið er blivið 19 ár, verður endurgjaldið niðurskrivað sambært niðanfyri standandi talvu. Niðurskrivingin ávirkar ikki tryggingargjaldið.

| **Aldur** | **Endurgjald í %** |
|---|---|
| 0–19 ár | 100% |
| 20 ár | 85% |
| 21 ár | 70% |
| 22 ár | 55% |
| 23 ár | 40% |
| 24 ár | 25% |
| 25 ár og eldri | 0% |

**3.6 Endurgjald verður ikki latið:**

1. Fyri útreiðslur til djóralækna fyri kanningar, viðgerðir, eftirlit, heilivág, avlíving o.a.
2. Um rossið doyr orsakað av sjúku innan 60 dagar eftir, at tryggingin varð teknað. Tað er ongin bíðitíð, um rossið doyr orsakað av skaða.
3. Tá sjúkan ella skaðin eru orsakaði av at tann, ið hevur rossið, hevur elvt til sjúkuna ella skaðan við vilja ella av grovum ósketni.
4. Um orsøkin til avlívingina er, at rossið, av grovum ósketni hjá eigara, kom ov seint undir djóralækna-hond.
5. Um rossið doyr undir kapprenning ella venjing til kapprenning.
6. Um rossið verður avlívað orsakað av sálarligari sjúku ella stríðshuga.
7. Um rossið verður avlívað uttan nakra medisinska grundgeving.
8. Um rossið doyr orsakað av sjúku, ið var til staðar, tá tryggingin varð teknað – hóast sjúkan ikki varð staðfest, fyrr enn eftir at tryggingin kom í gildi.
9. Um rossið doyr av sjúku, sum er íkomin, av tí at rossið ikki er koppsett sambært galdandi forskriftum, krøvum ella tilmælum frá djóralækna.
10. Um rossið doyr orsakað av vánaligum viðurskiftum í fjósinum/stallinum ella á beitinum, har rossið gongur.
11. Um rossið verður avlívað orsakað av varandi og ólekjandi breki ella sjúku í beinunum, sum hava við sær pínu og/ella lamni. Serstøk trygging kann tó teknast fyri hetta, sí grein 6.

3.7 Trygd hevur rætt til at krevja líkuppskurð. Um Trygd krevur líkuppskurð, rindar Trygd kostnaðin av hesum.

3.8 Læknaváttanir, eftir at rossið er tryggjað, verða bert endurrindaðar, um Trygd hevur biðið um tær.

3.9 Í sambandi við skaða ella sjúka skal rossið kannast av djóralækna skjótast gjørligt, og møgulig viðgerð skal fremjast beinanvegin.

3.10 Skal rossið avlívast, er tað ein treyt fyri endurgjaldi, at avlívingin verður framd av útbúnum djóralækna. Skjalprógv fyri avlívingini skal sendast til Trygd, áðrenn endurgjald kann verða latið.

## 4. Felagstreytir

**4.1 Tá trygging verður teknað**

4.1.1 Tryggingartakarin hevur ábyrgdina av, at allar upplýsingar í tryggingarskjalinum eru rættar.

4.1.2 Skeivar upplýsingar kunnu hava við sær, at rætturin til endurgjald verður avmarkaður ella fellur burtur. Sí í hesum sambandi Tryggingaravtalulógina §§ 4-10.

**4.2 Trygging sambært øðrum tryggingarskjali (dupulttrygging)**

4.2.1 Er trygging teknað í øðrum felag fyri somu ross og sama váða, er talan um dupulttrygging. Hetta merkir, at feløgini skulu deilast um útreiðslurnar í sambandi við skaða.

4.2.2 Hevur hitt felagið tikið fyrivarni fyri, at møguligt endurgjald verður avmarkað ella fellur burtur, um trygging er teknað í meira enn einum felagi, eru somu fyrivarni galdandi fyri hesa trygging. Tryggingarnar rinda tá lutfalsligt endurgjald.

4.2.3 Hevur Trygd veitt endurgjald vísandi til tryggingar-treytirnar, gongur Trygd inn í rættindini hjá tryggjaða mótvegis øðrum, ið kunnu ábyrgdast fyri skaðan.

**4.3 Rindan av tryggingargjaldi**

4.3.1 Fyrsta tryggingargjaldið og uppkravsgjald fella til gjaldingar samstundis, sum tryggingin kemur í gildi, og seinni tryggingargjøld og uppkravsgjøld teir gjalddagar, sum ásettir eru í tryggingarskjalinum.

4.3.2 Gjaldskrøv verða send á ta adressu, ið tryggingartak-arin hevur tilskilað. Verður flutt, skal nýggi gjalds-staðurin verða fráboðaður Trygd beinanvegin.

4.3.3 Verður tryggingargjaldið ikki goldið aftaná fyrsta krav, sendir Trygd nýggja skrivliga gjaldsáminning til ta adressu, tryggingartakarin hevur tilskilað, og tryggingartakarin verður skuldskrivaður fyri áminningargjald.

4.3.4 Í áminningarskrivinum verður tilskilað, hvør rættarfylgjan er, verður tryggingargjaldið ikki goldið innan ta í skrivinum ásettu freistina.

4.3.5 Tílík áminning verður ikki send, fyrrenn minst 14 dagar eru farnir síðani fyrsta gjaldskrav. Verður ikki goldið innan 14 dagar eftir áminningina, eru felagsins skyldur falnar burtur.

**4.4 Prístalsviðgerð**

4.4.1 Tryggingargjaldið verður javnað sambært brúkaraprí-stalinum hjá Hagstovu Føroya einaferð um árið. Grundarlagið er prosentvøksturin av brúkarapístali-num fram til 3. ársfjórðing samanborið við sama tíðarskeið árið fyri. Broytingin fær virknað til høvuðsforfall á tryggingini. Er prosentvøksturin minni enn 2%, verður gjaldið tó javnað við 2%. Verða ongi nýtilig almenn brúkaraprístøl kunngjørd, hevur Trygd rætt til at javna við øðrum grundarlagi.

**4.5 Broyting av tryggingartreytum og gjaldsskrá v.m.**

4.5.1 Ger Trygd broytingar í tryggingartreytum og tryggingargjaldi, hevur felagið rætt til at seta hesar broytingar í verk við 30 daga freist til mánaðarlok.

4.5.2 Vil tryggingartakarin ikki góðkenna hesar broytingar, kann hann krevja tryggingina setta úr gildi. Tryggingartakarin hevur tá skyldu at boða felagnum frá hesum 14 dagar áðrenn gjalddag, og tryggingin er tá at meta uppsøgd frá tí degi at rokna, tá broytingarnar komu í gildi.

4.5.3 Verður broytingin gjørd í sambandi við skaða, er grein 4.9.2 galdandi.

4.5.4 Prístalsjavning er ikki at meta sum broyting í gjaldsskránni.

4.5.5 Verður tryggingargjaldið goldið, eftir at tryggingartakarin hevur fingið fráboðan um broytingina, er hetta at meta sum at tryggingartakarin hevur góðtikið broytingina.

**4.6 Váðabroytingar**

4.6.1 Tryggingartakarin hevur skyldu at boða Trygd frá, soleiðis at støða kann verða tikin til um, og undir hvørjum treytum, tryggingin kann halda fram, tá upplýsingar í tryggingarskjalinum eru skeivar.

4.6.2 Verður fráboðan ikki send Trygd, kann hetta hava við sær, at endurgjaldsskylda felagsins minkar ella fellur burtur.

4.6.3 Høvdu broytingar ført við sær, at felagið ikki hevði yvirtikið váðan, steðgar ábyrgd felagsins í somu løtu, sum váðabroytingin hendi.

**4.7 Sertreytir**

4.7.1 Um serligar treytir eru galdandi fyri tryggingina, er hetta tilskilað á tryggingarskjalinum.

**4.8 Serlig undantøk**

4.8.1 Tryggingin fevnir ikki um skaða, ið er orsakaður av ella verður verri av:

a) At farið er illa við rossinum.

b) At rossið er vanrøkt.

c) At brot er framt á almennar forskriftir ella forskriftir/leiðbeiningar frá djóralækna.

d) Kríggi ella viðurskiftum álík kríggi, borgarakríggi, uppreistri, innanlendis ófriði og hendingum, ið standast av at gera seg inn á uttanveltað.

e) Jarðskjálvta ella øðrum náttúruólagi.

Tó verður goldið í Danmark og Grønlandi, og á ferðum uttanlanda í upp til 3 mánaðir.

f) At kjarnorka og geislavirkin máttur sleppa út.

Skaði av kjarnorku til vanligt ídnaðarligt, læknafrøðiligt ella vísindaligt endamál verður tó endurgoldin, um so er, at galdandi fyriskipanir hava verið fylgdar og ikki hava staðið í sambandi við reaktor– ella acceleratorvirksemi.

**4.9 Gildistíð og uppsøgn**

4.9.1 Tryggingin er framhaldandi og stendur við, til tryggingartakarin ella Trygd skrivliga siga hana upp við 30 daga freist til mánaðarlok.

4.9.2 Tá skaði er avgreiddur, hava bæði tryggingartakarin og Trygd rætt at siga tryggingina upp við 14 daga ávaring, um hetta verður gjørt innan 14 dagar eftir, at skaðin antin er goldin ella avvístur.

4.9.3 Rossalívstryggingin fer úr gildi, uttan uppsøgn, fyrsta høvuðsforfalli eftir, at rossið er 25 ár. Uppsøgnin er endalig, og § 89 í Tryggingaravtalulógini er sostatt ikki galdandi fyri hesa trygging.

**4.10 Skaði, elvdur við vilja ella av ósketni v.m.**

**4.10.1 Grovt ósketni**

Hevur tryggjaði elvt til skaða við vilja ella av grovum ósketni, kann hann, sambært tryggingaravtalulógini §§ 18–19, eftir umstøðunum missa rættin til endurgjald.

**4.10.2 Identifikatión (javnseting)**

Sama er galdandi, um skaðin er elvdur av hjúnarfelaga ella sambúgva, ið livir saman við tryggjaða.

**4.10.3 Vanligt ósketni**

Hevur tryggjaði elvt til skaðan av ósketni, ið ikki kann kallast grovt, kann Trygd, sambært Tryggingaravtalulógina § 20, avmarka endurgjaldið við upp til 5%.

**4.10.4 Skaði hendur av, at tryggjaði var ávirkaður av rúsandi løgi ella evni**

Endurgjaldið kann eftir umstøðunum verða niðurskrivað ella fella burtur.

**4.11 Kærumøguleikar**

4.11.1 Er ósemja millum teg og Trygd um tryggingarviðurskifti, ella ert tú t.d. ónøgdur við avgerð, ið er tikin í sambandi við skaða, kanst tú, eftir at hava roynt semju við viðkomandi deild, venda tær til kæruviðgera okkara. Sí fleiri upplýsingar á heimasíðu okkara, **www.trygd.fo**.

4.11.2 Tú hevur eisini møguleika at senda skrivliga kæru til kærunevndina fyri trygging:

Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaards Gade 2,1
1572 København V

Tlf. +45 33 15 89 00
Fax +45 33 15 89 10

Telefontíð kl. 10.00-13.00 (donsk tíð)
Heimasíða: **www.ankeforsikring.dk**

4.11.3 Serligt oyðublað til kæruna fæst á heimasíðu okkara:

**www.trygd.fo** ella á **www.ankeforsikring.dk**.

4.11.4 Eitt ávíst kærugjald skal gjaldast, tá kært verður. Kærugjaldið sæst á heimasíðuni hjá kærunevndini, www.ankeforsikring.dk. Gjaldið verður endurgoldið, um tú fært fult ella lutvíst viðhald í kæruni.

**4.12 Skyldan hjá tryggjaða**

Tað er skyldan hjá tryggjaða altíð at halda tær ásetingar, ið galdandi djóraverndarlóg ásetur. Heldur tryggjaði ikki ásetingarnar í lógini ella hesi trygging, kann rætturin til endurgjald verða avmarkaður ella fella burtur.

**4.13 Iðranarrættur**

**(bert galdandi fyri privatar tryggingar)**

4.13.1 Tú kanst angra keypið av hesi trygging.

4.13.2 Iðranarfreistin er 14 dagar. Freistin gongur frá tí degi, tú hevur fingið fráboðan um, at tryggingin er teknað. Freistin er tó í fyrsta lagi galdandi frá tí degi, tú á skrift hevur fingið upplýsing um iðranarrættin.

4.13.3 Gongur freistin út ein halgidag, leygardag, sunnudag, grundlógardag, jólaaftan ella nýggjársdag, verður freistin longd til næsta gerandisdag.

4.13.4 Um tú ynskir at angra keypið av tryggingini, skalt tú boða Trygd skrivliga frá hesum, áðrenn freistin gongur út.

## 5. Skaðafráboðan

### 5.1 Tá ið skaði hendir

5.1.1 Hendir skaði, hevur trygginartakarin skyldu til, eftir førimuni, at fyribyrgja ella avmarka skaðan, eins og Trygd hevur rætt at seta tiltøk í verk við sama endamáli.

5.2 Ein og hvør tilburður, ið kann væntast at viðføra krav um endurgjald, skal fráboðast Trygd beinavegin.

5.3 Ringið á telefon **35 81 00** ella farið inn á **www.trygd.fo** og fráboðið skaðan.

### 5.4 Skaðatænastan

Eftir kl. 16 gerandisdagar, tó hósdag eftir kl 17, vikuskiftis- ella halgidagar, ber til at ringja til Skaðatænastuna á telefon 32 13 12.

### 5.5 Skyldur tryggingartakarans í sambandi við skaða

Tað áliggur tryggjaða fyri egna rokning at:

1. Geva djóralækna boð beinanvegin, um rossið fær skaða, verður sjúkt ella vísur tekin til at verða sjúkt.
2. At fáa fatur á øllum neyðugum skjalprógvi, sum eru neyðug fyri at viðgera eitt krav um endurgjald.
3. Tá talan er um stuldur, beinanvegin at fráboða stuldurin til løgregluna.

5.6 Tá ræður um ábyrgdarskaða, skal fráboðan sendast Trygd beinanvegin endurgjaldskrav verður sett fram, ella roknast kann við tí. Endurgjaldsskylda og støðd á endurgjaldskravi mugu ikki verða góðkend uttan samtykki felagsins.

5.6.1 Hevur tryggjaði játtað endurgjaldsábyrgd ella endurgjaldsupphædd uttan góðkenning frá Trygd, má hann sjálvur bera útreiðslurnar í hesum sambandi.

5.6.1.1 Sama er galdandi, um hann hevur sett onnur tiltøk í verk, uttan góðkenning frá Trygd.

5.7 Endar eitt mál um endurgjald í rættinum, verður rættarsakin førd í navninum hjá tryggjaða.

## 6. Trygging fyri varandi og ólekjandi breki ella sjúku í beinunum

**(er bert galdandi, um tað er tilskilað á tryggingarskjalinum)**

### 6.1 Treyt fyri tryggingini

6.1.1 Fyri at trygging fyri varandi og ólekjandi breki ella sjúku í beinunum kann teknast, skulu røntgenmyndir takast av beinunum á rossinum, áðrenn tryggingin verður teknað.

6.1.2 Tað er ein treyt, at djóralækni váttar, at rossið er frískst og ongi tekin síggjast á røntgenmyndunum um, at brek ella sjúka er um at taka seg upp í beinunum.

6.1.3 Tryggingartakarin ber sjálvur kostnaðin av røntgenmyndunum.

6.1.4 Trygging fyri varandi og ólekjandi breki ella sjúku í beinunum kann bert teknast saman við rossalívstrygging sambært grein 3.

### 6.2 Hvat fevnir tryggingin um?

6.2.1 Tryggingin veitir endurgjald um rossið:

1. Doyr sum fylgja av varandi og ólekjandi breki ella sjúku í beinunum.
2. Verður kravt avlívað av djóralækna, sum fylgja av breki ella sjúku, sambært nr. 1.
   a) Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at djóralækni váttar, at avlívingin var neyðug.

### 6.3 Áseting av endurgjaldinum

6.3.1 Endurgjaldið kann ikki fara uppum tryggingarupphæddina, ið er nevnd í tryggingarskjalinum undir rossalívstryggingini.

6.3.2 Eftir at rossið er vorðið 14 ár, verður endurgjaldið niðurskrivað sambært niðanfyri standandi talvu. Niðurskrivingin ávirkar ikki tryggingargjaldið.

| Aldur | Endurgjald í % |
|---|---|
| 0–14 ár | 100% |
| 15 ár | 85% |
| 16 ár | 70% |
| 17 ár | 55% |
| 18 ár | 40% |
| 19 ár | 25% |
| 20 ár og eldri | 0% |

### 6.4 Endurgjald verður ikki latið:

1. Fyri útreiðslur til djóralækna fyri kanningar, viðgerðir, eftirlit, heilivág, avlíving o.a.
2. Um rossið doyr orsakað av sjúku ella breki innan 60 dagar eftir, at tryggingin varð teknað.
3. Tá sjúkan ella skaðin eru orsakaði av at tann, ið hevur rossið, hevur elvt til sjúkuna ella skaðan við vilja ella av grovum ósketni.
4. Um orsøkin til avlívingina er, at rossið, av grovum ósketni hjá eigara, kom ov seint undir djóralæknahond.
5. Um rossið verður avlívað uttan nakra medisinska grundgeving.
6. Um rossið doyr orsakað av sjúku, ið var til staðar, tá tryggingin var teknað – hóast sjúkan ikki varð staðfest, fyrr enn eftir at tryggingin kom í gildi.
7. Um rossið doyr orsakað av vánaligum viðurskiftum í fjósinum/stallinum ella á beitinum, har rossið gongur.

**P/F Trygd**
**Tryggingarfelag**

Oknarvegur 5
P.O. Box 44
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 358 100
Fax +298 317 211
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

**Trygd hugsar um teg**

sendistovan